


## Maersk undir ákæru í Kina

Korruptión, arbeiðsumstøður, sum eru vandamiklar fyri heilsuna, og mannminkandi arbeiðsreglur eru gerandisdagur hjá teimum, ið starvast hjá A.P Møller, byngjufabrikkini hjá Maersk í Kina. Tað er mannarættindafelagið Globalization Monitor, sum hevur kastað ljós á arbeiðsumstøðurnar hjá kinesiska starvsfólkinum hjá Maersk. Tað skrivar Politiken. Sambært rapportini líða starvsfólkini av lungnatrupulleikum orsakað av nógvum støvi, hoyriskaðum orsakað av ov nógvum larmi, og tey verða kropsliga straffað, um tey ikki akta boðini frá yvirfólkinum. Og fara tey í verkfall, er ógvuliga sannlíkt, at tey missa arbeiðið. Korruptiónin hjá millumleiðarum er stór, og teir gjalda seg til hægri leiðarastørv, verður sagt í rapportini. Stjórin á bingjuverksmiðjuni vísir ákærunum aftur, og sigur, at umstøðurnar eru nógvar ferðir betri hjá Maersk enn tey eru á øðrum verksmijum í Kina.

# Línuskip smáligan fiskiskap

**Seinastu dagarnar hava tilsamans sjey línuskip landað í Klaksvík, men nøgdirnar eru smáar. Veiðan hjá skipunum liggur úr 30.000 pundum upp í sløk 60.000 pund**

FISKISKAPUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Línuskipini í Klaksvík hava verið inni og landað.

Túrarnir hava ikki allir verið líka langir, men sum heild verður sagt frá smáligum fiskiskapi.

Seinasta fríggjadag landaðu tvey skip, og í dag landa fimm skip.



Kvik og Fugltúgvan, sum landaðu fríggjadagin, høvdu 30.000 pund í part.

Í dag eru so fimm skip inni. Tey eru Klakkur við 54.000 pundum, Jákup B við 57.600, Polarstjørnan við 30.000, Grani við 37.200 og Morgunstjørnan við sløkum 11.000 pundum.

### Blandað veiða

Pól Fuglø, landingarformaður í Klaksvík, sigur, at fiskurin hjá línuskipunum er blandaður.

- Av veiðini hjá Klakki er umleið ein góður triðingur toskur, meðan restin er hýsa, brosma og annar fiskur.

Hann vísir á, at hjá onkrum skipi er umleið ein helmingur av veiðini toskur, og síðan eru fiskasløgini blandað við eitt nú hýsu, brosmu og øðrum.

- Grani, sum hendan túrin hevði sløk 40.000 pund, hevur roynt á Íslandsrygginum, og hjá teimum var at kalla øll veiðan toskur, sigur Pól.

Sum skilst, hevur línuskipið Helena verið á bedding í Klaksvík, men ætlandi fer skipið avstað aftur í morgin.

- Eg vænti, at øll línuskipini fara útaftur í morgin og mikudagin, sigur landingarformaðurin.

*- Tað merkist týðiliga, at teir seks partrolararnir ikki longur eru partur av skipaflotanum í Klaksvík, sigur landingarformaðurin, Pól Fuglø*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Smálig veiða

Landingartølini siga okkum, at línuskipini ikki hava verið í nógvum fiski. Veiðan er sum heild smálig, tó at fleiri túrar ikki hava verið so drúgvir og seturnar lutfalsliga fáar.

Veðrið seinastu dagarnar hevur eisini verið óstøðugt og heldur buldrasligt.

- Nei, eg haldi, at línuskipini sum heild lata illa at fiskiskapinum hesar fyrstu dagarnar av árinum, sigur Pól.

Fiskaprísurin hevur eisini verið órógvaður av marknaðarviðurskiftunum og keypiorkuni hjá føroysku fiskavirkjunum, men landingarformaðurin heldur ábendingar vera um, at prísirnir nú eru á veg uppeftir aftur.




*Fiskiskapurin hjá línuskipunum er smáligur. Av teimum fimm skipunum, sum landa í Klaksvík í dag, hevur Jákup B størstu nøgdirnar, 57.600 pund*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Tað merkist

Síðan jóla-og nýggjárshøgtíðina hevur lítil útróður verið í Klaksvík, men fyrrapartin í síðstu viku vóru nakrir bátar úti.

Pól heldur annars, at fiskiskapurin hjá bátunum, sum hava verið onkran túr í ár, hevur verið brúkiligur.

Spurdur um tað merkist, at teir seks trolararnir, sum Maru Seafood hevði, nú ikki longur eru partur av fiskiskipaflotanum í Klaksvík, sigur hann:

- Jú, tað merkist væl, og vit kunnu bara harmast um støðuna, soleiðis sum hon er vorðin.

Pól Fuglø, landingarformaður, sigur, at munandi minni landing hevur verið á Kósini, og seinni seldir á tvingsilssølu í fjør heyst.

# Nógv landing í Saltangará í vikuskiftinum

**Ikki færri enn seks ísfiskatrolarar landaðu í Saltangará leygardagin, og hetta hevði við sær, at heili 18 mans vóru til arbeiðis á landingarmiðstøðini í Saltangará í vikuskiftinum**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tá arbeiðsorkan er stór, og væl verður skipað fyri, letur nógv seg gera, tá neyðugt er at taka tøk.




*Fríggjadagin og leygardagin landaðu 10 ísfiskatrolarar í Saltangará*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Soleiðis var í Saltangará í vikuskiftinum.

Fríggjadagin og leygardagin landaðu ikki færri enn 10 ísfiskatrolarar í Saltangará. Allir høvdu nógvan fisk, og hetta merkti, at neyðugt var við nógvum fólki til arbeiðis á landingarmiðstøðini í Saltangará.

Landað varð við trimum holdum, har 4 eru í hvørjum holdi, umframt menn í krana og á trucki.

Soleiðis telir hvørt landingarlið tilsamans seks mans, og á trimum liðum eru teir tá 18 í tali.

### Nógvur fiskur

Fríggjadagin landaðu leirvíkstrolararnir, Polarhav og Stjørnan, umleið 350.000 pund og Jaspis og Ametyst 220.000 pund.

Leygardagurin var hin stóri dagurin. Tá vóru ikki færri enn seks skip inni, øll við nógvum fiski.

Skipini, sum hendan dagin høvdu størstu nøgdirnar, vóru Heykur og Falkur, sum høvdu stívliga 400.000 pund tilsamans.

Hini bæði pørini hjá Faroe Seafood, Stelkur og Bakur og Rókur og Lerkur, høvdu ávikavist 320.000 pund í part.

At kalla øll veiðan hjá ísfisktrolarunum er upsi.

### Váðasteinur landar

Á landingarmiðstøðini verður ikki roknað við tí nógva í hesi vikuni, nú allir partrolararnir hava verið inni.

Væntandi er tó, at línuskipið Váðasteinur kemur inn at landa.

Teir hava roynt á Íslandsrygginum, og væntandi er, at Váðasteinur fer at hava stívliga 50.000 pund, tá teir koma inn at landa.